ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 12. januar 2010




Landsliðsvenjarin kundi hugsað sær betri tíð til fyrireikingar. Men sum hann sigur, so eru treytirnar tær somu hjá øllum landsliðsvenjarum

# Landsliðsvenjarin ynskir fleiri venjingar

**– Tað er ein trupulleiki fyri landsliðsvenjarar kring heimin, at tað er torført at nøktandi tímatal at fyrireika landsliðini til ymsu uppgávurnar. Men vit eru til reiðar at stríðast, sigur Dia Midjord, landsliðsvenjari, undan HM-undandystunum um vikuskiftið**




Uni Holm Johannesen

Dia Midjord, landsliðsvenjari, leggur í løtuni seinastu hond á fyrireikingarnar til HM-undandystirnar sum verða um vikuskiftið. Føroyski landsliðshópurin hevur seinasta mánaðin arbeitt miðvíst fram móti dystunum móti Sveis, Hvítarusslandi og Kypros. Men landslisðvenjarin staðfestir, at fyrireikingarnar kundu verið betri.

Hondbóltsspælarar eru í heilum upptiknir av dystum í landskappinginí og steypakappingini, og tað ávirkar sjálvsagt.

- Tað er ein trupulleiki fyri landsliðsvenjarar kring heimin. Tað er torført at fáa venjingartímar at fyrireika landsliðini til ymsu uppgávurnar. Leikararnir spæla týðandi dystir við feløgunum hvørja viku, og tí má eg sum landsliðsvenjari sjálvandi laga meg eftir teimum, sigur Dia Midjord, landsliðsvenjari, og leggur afturat, at fyrireikingarnar hesa ferð kundu verið betri.

Landsliðshópurin var nógv saman í døgunum millum jól og nýggjár. Tá kom úttøkan og annað grundleggjandi upp á pláss.

## Møguleikin er móti Kypros

Mótstøðan hjá føroyska landsliðnum um vikuskiftið verður alt annað enn løtt at syfta. Føroyar hava áður roynt seg móti Sveis, og tá taptu føroyingarnir stórt. Hvítarussland spældi fyri stuttum javnt móti Russlandi, og Kypros er í sama styrkibólki sum Italia, sum vann tvær reisur á Føroyum í EM-undankappingini í fjør.

Dia Midjord sigur, at tað er serliga í dystinum móti Kypros, at føroyingarnir skulu vóna at fáa stig.

– Heilt yvirskipa skulu vit syrgja fyri at standa okkum so væl sum gjørligt móti Sveis og Hvítarusslandi. Vit vita, at vit kunnu fáa eitt fantastiskt úrslit, um alt gongur upp í eina hægri eind. Um mótstøðuliðini undirmeta okkum, samstundis sum tað gongur teimum illa og alt riggar hjá okkum. Men tað er móti Kypros, at vit hava møguleikan at spæla við.

Er tað realistiskt at fáa stig?

– Ja, í seinasta dystinum. Men tað skal eisini sigast, at vit eru ikki favorittar til dystin, sigur Dia Midjord, landsliðsvenjari.

## Sær framstig

Dia Midjord hevur havt landsliðið um hendi seinastu árini. Hann sigur seg síggja greiða framgongd, hóast saknur er í stórskjúttum.

– Men støðuga landsliðsarbeiðið seinastu árini hava við sær, at vit hava ein samansettan hóp nú. Tað hava vit ikki reiðiliga havt áður. Vit hava royndar og garvaðar leikarar, aðrir eru við at vinna sær fasta legu á landsliðnum, og summir eru við sum menningaleikarar, sigur Dia Midjord, sum gleðist um, at Heini Hanusarson hesa ferð hevur verið við í fyrireikingunum frá byrjan.

– Hann hevur seinastu árini spælt í Danmark og hevur tí bara luttikið í seinastu venjingunum. Nú er hann fluttur heim og hevur verið við allatíð. Tað merktist í hópinum. Vit eru hóast alt væl til og til reiðar at stríðast, sigur Dia Midjord, landsliðsvenjari.

## Føroyski hópurin

| | |
|---|---|
| Levi Nybo (málverji) | H71 |
| Janus Sørensen | H71 |
| Dánjal Tórgarð | H71 |
| Esbern Patursson | H71 |
| Poul Kjartan Dam | H71 |
| Bárður Johannesen | Kyndil |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil |
| Tummas Pauli Hanusarson | Kyndil |
| Ári Egason Dam (málverji) | Neistin |
| Heini Hanusarson | Neistin |
| Finnur Hansson | Neistin |
| Tróndur Kragesten | Neistin |
| Carl Herup Olsen | Neistin |
| Sámal Joensen | VÍF |
| Bjarti Hansen | VÍF |

## HM-undandystirnir

| | |
|---|---|
| Sveis – Føroyar | Fríggjadagin, 15. januar |
| Hvítarussland – Føroyar | Leygardagin, 16. januar |
| Kypros – Føroyar | Sunnudagin, 17. januar |

## Tummas Pauli og Bjarti eru menningarleikarar

Tvey nýggj andlit eru í hópinum hesaferð. Tummas Pauli Hanusarson úr Kyndli og Bjarti Hansen úr VÍF

Tummas Pauli Hanusarson og Bjarti Hansen úr ávíkavist Kyndli og VÍF eru hesa ferð við í landsliðshópinum fyri fyrstu ferð. Dia Midjord, landsliðsvenjari, sigur, at tað er týdningarmikið fyri ungar spælarar at sleppa í landsliðshitan.

– Teir eru menningarleikarar, um vit kunnu rópa tað soleiðis. Vit vilja altíð hava ein varieraðan landsliðshóp, og teir mynda teir unglingabólkin hesaferð. Taka teir hondbóltin í álvara fram yvir við styrkivenjing og øðrum, fara teir heilt víst at gerast stuðulsleikarar á landsliðsliðnum eina ferð í framtíðini, sigur Dia Midjord, landsliðsvenjari.

**Uni**